NORÐOYA SPARIKASSI

# Ársroknskapur 1999

## Rakstrarroknskapur 1999

| | 1999 1.000 DKK | 1998 1.000 DKK |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 55.226 | 56.897 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 16.006 | 19.787 |
| **Netto rentuinntøkur** | **39.220** | **37.110** |
| Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 39 | 31 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.147 | 945 |
| Útreiðslur til kostnað og provisión | 38 | 85 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **40.368** | **38.001** |
| Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | - 5.907 | +844 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 929 | 950 |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 21.975 | 20.782 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 748 | 1.463 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 587 | 577 |
| Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | +5.970 | - 442 |
| **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **18.050** | **16.531** |
| Skattur | 1.866 | 4.017 |
| **Ársúrslit** | **16.184** | **12.514** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 16.184 | 12.514 |
| Flutt úr gávugrunni | 1.500 | 1.500 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 146.800 | 134.286 |
| **Til taks tilsamans** | **164.484** | **148.300** |
| Lagt í gávugrunn | 500 | 1.500 |
| At flyta til næsta ár | 163.984 | 146.800 |
| **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **164.484** | **148.300** |

## Figgjarstøða 1999

| | 1999 1.000 DKK | 1998 1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 4.847 | 3.704 |
| Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 47.670 | 99.807 |
| Útlán | 611.552 | 511.586 |
| Lánsbrøv | 158.973 | 187.130 |
| Partabrøv o.a. | 642 | 380 |
| Ítøkiligar ognir | 11.422 | 10.327 |
| Aðrar ognir | 3.344 | 3.101 |
| **Ogn tilsamans** | **838.450** | **816.035** |
| **Skuld og eginpeningur** | | |
| **Skuld** | | |
| Skuld til peningastovnar | 2.115 | 2.048 |
| Innlán | 662.141 | 652.818 |
| Onnur skuld | 4.816 | 6.638 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 2.331 | 3.978 |
| **Skuld tilsamans** | **671.403** | **665.482** |
| **Eginpeningur** | | |
| Ábyrgdarapeningur | 2.563 | 2.253 |
| Gávugrunnur | 500 | 1.500 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 147.800 | 134.286 |
| Flutt frá ársúrsliti | 16.184 | 12.514 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **167.047** | **150.553** |
| **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **838.450** | **816.035** |
| **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| Ábyrgdir o.a. | 12.772 | 6.555 |
| Aðrar ábyrgdir | 9.697 | 0 |
| **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **22.469** | **6.555** |

GRAFISKT DESIGN 457171



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Í blaðnum í morgin hava vit úrslit og málskjúttar í teimum báðum fyrstu umførunum í 3. deild**

# Nú skal Eysturoyingur takast

*Av teimum 93 bátunum, sum hava boðað frá luttøku eru 9 spildurnýggir. Av teimum 9 eru 4 tíggjumannafør, so líkt er til, at nú ætla hini feløgini at taka Eysturoying*

JÁKUP MØRK

Áhugin fyri kappróðraítróttini tykist í løtuni at vera vaksandi. Sum nevnt omanfyri, so hava 93 bátar boðað frá luttøku komandi kappingarár, og er hetta væl meira enn í fjør.

Av hesum 93 bátum eru ikki færri enn níggjú spildurnýggir bátar, sum fyri fyrstu ferð skulu luttaka í FM róðrinum.

Hjá 5-mannaførum eru tað tað Falkur úr Hósvík og Dúgvan úr Sørvági, sum Kaj Hammer úr Havn hevur smíða, umframt at Sámal Hansen úr Runavík hevur bygt Frúnna til Miðvágs Róðrafelag og nýtt Tjaldur til Kappróðrarfelagið NSÍ.

Eitt nýtt 6-mannafar er bygt, og eru tað havnarmenn og -kvinnur, sum hava fingið nýggjan Gongurólv.

Eftir at Eysturoyingur hevur verið fullkomuliga einaráðandi tey bæði seinnu árini, halda fleiri av hinum kappróðrafeløgunum seg hava lurt runavíkingarnir av. Nýggjur bátur tykist vera loysnin, og hetta árið vera ikki færri enn fýra nýggj tíggjumannafør, harav Sámal Hansen, sum smíðaði Eysturoying, hevur gjørt tveir teirra.

Bátarnir úr hondunum hjá Sámali eru nýggi Havnarbáturin og nýggi Nólsoyingur. Eisini vestmenningar og vágbingar hava latið nýggjan bát bygt. Olaf Haldansen hevur smíðað Vestmenningin, meðan Kaj Hammer hevur bygt Vágbing.



*Ein vanlig sjón seinnu árini. Eysturoyingur við kós móti málinum, fleiri bátslongdir framman fyri hinar bátarnar. Nú eru tó fleiri, sum ætla, at vend skal koma í hesum viðvíkjandi*

## Bátsmanningarnir, sum hava boðað frá luttøku eru hesir:

**5-mannafør, dreingir**
Aldan
Báran
Beinta
blikur
Broddur
Bylgjan
Drekin
Dúgvan
Falkur
Fípan Fagra
Firvaldur
Glyvrabáturin
Havfrúgvin
Hvassi
Junkarin
Kollur
Royndin Fríða
Sílið
Svanur
Tjaldrið
Ørnin

**5-mannafør, gentur**
Aldan
Báran
Beinta
blikur
Broddur
Drekin
Dúgvan
Falkur
Fípan Fagra
Firvaldur
Frúgvan
Glyvrabáturin
Havfrúgvin
Hvassi
Junkarin
Kollur
Royndin Fríða
Sílið
Súlan
Svanur
Tjaldrið
Ørnin

**6-mannafør, kvinnur**
Fuglfrirðingur
Gongurólvur
Hósvíkingur
Hvessingur
Jarnbardur
Kollfirðingur
Leirvíkingur
Lómur
Páll Fangi
Riddarin
Snopprikkur
Sólmundur
Strálan

**6-mannafør, menn**
Gongurólvur
Hósvíkingur
Hvessingur
Kollfirðingur
Leirvíkingur
Lómur
Páll Fangi
Snoprikkur
Sólmundur
Strálan

**8-mannafør**
Argjabáturin
Fríggjarin
Gullbrandur
Heiðabáturin
Húsavíkingur
Knørrur
Kvívíkingur
Miðvingur
Nevið Reyða
Oyndri
Sandavágsbáturin
Sjóriddarin
Toftabáturin
Víkarbáturin
Ørvur

**10-mannafør**
Eysturoyingur
Havnarbáturin
Kjølur
Klaksvíkingur
Tívil
Nólsoyingur
Skálabáturin
Suðringur
Vágbingur
Vestmannabáturin
Vestmenningur

# TSF skipar fyri barnasúkkling

*TSF skipar á fyrsta sinni fyri venjing fyri børn og ung*

Hvørt mánakvøld í summar fer Tórshavnar Súkklufelag at skipa fyri súkkluvenjing fyri børn og ung. Byrjað bleiv 1. mai og venjingin heldur fram til síðst í september mánað.

TSF brýtur nú upp úr nýggjum, og fer í summar undir at skipa fyri venjing fyri børn og ung. TSF hevur fleiri ferðir skipa fyri kappingum millum børn og ung, men felagið ásannar, at alt ov lítið hevur verið gjørt við súkkluvenjing millum børn og ung.

Øll, gentir og dreingir eru vælkomin, men kortini eru treytir við. Kravið til tey, ið hava ætlanir um at súkkla er, at tey koma til venjing við lykt bæði framman og aftan, hava endurskin, og síðst, men ikki minst, at tey súkkla við hjálmi.

Eitt annað krav er eisini, og tað er, at børnini skulu ganga í 3. flokki fyri at venja við súkklufelagnum. Hetta fyri at trygdin skal vera sett í hásæti.

Tórshavnar Súkklufelag hevur sett ítróttalæraran Evald Rasmussen sum venjara. Evald hevur súkklað í fleiri ár, og í sínum dagliga arbeiði sum lærari og ítróttarlærari hevur hann havt nógv við børn og ung at gera.

- Vit fara við góðum treysti undir hetta tiltak, og vit í súkklufelagnum vóna, at hetta tiltak far góða undirtøku. Í byrjani fara vit túrar runt í býnum, og sum frá líður gerast túrarnir longri og longri. Eftirsum vit altíð ferðast í ferðsluni, ja so hevur tað sera stóran týdning, at trygdin er ílagi. Her verður serliga hugsað um hjálmin, ið altíð skal vera við, og sjálvandi eisini um bremsur og annað, sigur Evald Rasmussen at enda.

# Gí styrkir um verjupartin

*Eftir ætlan skuldi GÍ royna nýggjan leikara í dystinum móti HB í gjár*

JÁKUP MØRK

Gøtumenn hava borið skjótt av, síðani tað fyri viku síðani var greitt, at teir gjørdust ov stuttir í kappingini um at fáa fatur á føroyska verjuálitinum, Óla Johannesen.

Ætlanin var tá at styrkja um verjupartin, og hesar ætlanir eru framvegis frammi. Gøtumenn hava í løtuni ein 22 ára gamlan dana til royndarvenjingar, og eftir ætlan skuldi hann vera við á GÍ liðnum, sum í gjár skuldi royna seg móti HB í kappingini um løgmanssteypið.

### Sær betri út

Talan er um 22 ára gamla Martin Thomsen, sum undan føroyaferð síni hevur roynt seg í næstbestu donsku deildini, har hann hevur leikt við Holstebro.

Martin Thomsen er vinstrabeintur verjuleikari, so ætlanin er uttan iva, at nýta hann í miðverjuni ella á vinstra bakki, soleiðis at antin Súni Olsen ella Áslakur Petersen kunnu nýtast longur frammi á vøllinum.

Verður talan um varandi samstarv millum partarnar, er talan uttan iva um kærkomnan styrk hjá gøtumonnum. Undan kappingarársbyrjan var líkt til, at hópurin hjá GÍ var sera hart raktur av frágongd, men nú Henning Jarnskor er afturkomin, umframt at sáttmáli møguliga verður gjørdur við Martin Thomsen, eru vónirnar hjá skurunum kanska farnar at kvinka uppeftir.